# Brøndby javnt móti Deportivo

Leygardaginr var venjingardystur á Brøndby Leikvøllinum millum Brøndby og kenda spanska felagið, Deportivo La Coruna. Talan var eisini um ein sokallaðan Testimonial fyri at heiðra Per Nielsen, sum spældi sín síðsta dyst fyri Brøndby ígjár. 34 ára gamli miðverjin hevur spælt 548 dystir fyri Brøndby, og var hann eisini stórliga fagnaður ígjár. Deportivo legði seg á odda eftir ein hálvan tíma, men tíðliga í seinna hálvleiki javnaði Morten "Duncan" Rasmussen fyri Brøndby. Venjarin Tom Køhlert var væl nøgdur við aðalroyndina áðrenn fyrra UEFA Cup dystin, sum verður hóskvøldið. Hann helt liðið sýndi tíðum gott spæl. Mótstøðuliðið í UEFA Cup, B36 fær ein dag minni at fyrireika seg í, enn Brøndby. B36 tekur ímóti EB/Streymi í Gundadali í dag.



# B36-dysturin á 3+

Viasat sendir mest sum altíð beinleiðis, tá europiskur fótbóltur er á skránni hjá donskum feløgum, og komandi hóskvøld verður tað so dysturin millum Brøndby og B36, sum verður at síggja á skíggjanum. Byrjað verður at senda klokkan 18.30, og so er spurningurin, um B36-fjepparar tá fara at sita við skíggjan, ella um teir vera millum tey helst mongu á Tórsvølli, sum fara at hyggja eftir EB/Streymi, tá teir taka ímóti Mancester City.



AB er eftir 8-0 sigurin á heimavølli trý stig aftanfyri oddaliðini, men hevur spælt ein dyst færri enn VB/Sumba

Savnsmynd

# Skulu standa seg betri í Suðuroy

**07 Vestur er oddalið í summarsteðginum, og hóast liðið seinni í ár skal vitja tvær ferðir í Suðuroy, har vága-menn ikki hava vunnið stig í ár, so halda teir í 07 Vestur, at tað fer at eydnast teimum at vinna uppflyting**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú næstbesta deildin fór í summarfrí, eru tað 07 Vestur og VB/Sumba, sum eru á teimum báðum plássunum, sum eftir kappingarlok bera uppflyting í bestu deildina við sær.

Støðutalvan boðar frá, at tað eru bara hesi bæði liðini og so AB, sum tykjast hava møguleika at flyta upp. AB er eftir 8-0 stóran heimasigur leygardagin á HB trý stig aftanfyri tey bæði odda-liðini. Men AB hevur spælt ein dyst færri enn VB/Sumba, og tí eru argjamenn rættiliga væl við.

TB er á fjórða plássi, men tvøramenn eru so mikið langt aftanfyri, at tað ber illa til at ímynda sær, at teir skulu vinna uppflyting. Teir hava eisini spælt ein dyst fleiri enn AB og 07 Vestur.

07 Vestur vann toppupp-gerðina leygardagin á heima-vølli 3-1 á VB/Sumba. Tór-Ingar Akselsen er ein av stuðulsspælarunum hjá 07 Vestur, og hann var væl nøgdur:

- Talan var um tætta upp-gerð við nógvum nærdystum og høgari ferð. Eg haldi, at vit vóru betri alla tíðina, og at úrslitið væl vísti, hvussu dysturin myndaðist.

*Hvussu ert tú nøgdur við avrikið higartil í ár?*

- Tað hevur gingið, sum vit høvdu vónað. Einastu dystirnir, sum vit ikki eru nøgdir við, eru teir báðir, sum vit hava spælt í Suð-uroy. Tey avrikini vóru ikki góð. Vit skulu seinni í ár spæla bæði í Vági og á Tvøroyri. Tá fara vit at royna at vinna betri úrslit, enn vit hava megnað fyrr í ár. Men uttan mun til hvussu tað fer at hilnast, so rokni eg við, at vit fara at megna uppflyting.

*Fara tit eftir at verða nummar tvey, sum er plássið, ið ber uppflyting við sær?*

- Vit miðja eftir at vinna deildina og í hvussu so er at vinna uppflyting, sigur Tór-Ingar Akselsen, sum er ein av 07 Vestur monnunum, sum hevur royndir frá frem-stu deildini. Tór-Ingar hevur undanfarnu árini spælt við HB.

07 Vestur skal spæla á Tvøroyri í 22. umfari, sum verður 13. september, og 07 Vestur skal spæla í Vági í 25. umfari, sum verður 27. september.

Hesa ferð eydnaðist tað botnliðnum B68 at vinna fulla úrtøku við 2-1 heima-sigri á KÍ. Harvið leyp B68 upp um EB/Streym, sum nú er niðast. Hetta var sjeynda KÍ tapið á rað. KÍ hevur ikki vunnið síðani 17. mai, tá ið klaksvíkingar vunnu 1-0 á heimavølli ímóti B68.

## FAKTA um 1. deild

**12. umfar - 12. juli**

**AB-HB 8-0 (3-0)**
1-0: Dion Splidt
2-0: sjálvmál
3-0: sjálvmál
4-0: Thomas Hans Rubeksen
5-0: Thomas Hans Rubeksen
6-0: Thomas Hans Rubeksen
7-0: Evrard Blé
8-0: Dánial Rói Olsen
Reytt kort: Hendrik Rubeksen, HB

**07 Vestur-VB/Sumba 3-1 (1-1)**
1-0: Tór-Ingar Akselsen
1-1: Birgir Jørgensen
2-1: Jens Erik Rasmussen br
3-1: Jóan Petur á Stongum
Reytt kort: Martin Tausen VB

**B68-KÍ 2-1 (0-1)**
0-1: Arnhold Joensen
1-1: Súni Fríði Barbá
2-1: Óli Olsen

# Símun heldur fram í Keflavík




*Símun Samuelsen verður roknaður millum týdningar-mestu spælararnar hjá Keflavík, sum í løtuni er á odda í íslendsku Landsbankadeildini*

**Føroyski landsliðs-spælarin Símun Samuelsen og Kefla-vík skrivaðu leygar-dagin undir uppá, at samstarvið skal halda fram í trý ár afturat**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Símun Samuelsen heldur fram at spæla fótbólt í Keflavík í trý ár afturat. Leygardagin skrivaðu føroyski landsliðsspælar-in og Þorsteinn Magnús-son, formaður í fótbólts-deildini í Keflavík, undir upp á, at samstarvið skal halda fram.

Hjástaddur var eisini venjarin Kristján Guð-mundsson. Ábyrgdar-menninir í felagnum duldu ikki, at teir eru sera fegnir um, at tað nú er greitt, at Símun Samuel-sen fer at halda fram í fel-agnum. Føroyski spælar-in, sum fór til Keflavíkar á sumri í 2005, er væl umtóktur í felagnum og millum viðhaldsfólkini.

Sambært heimasíðu fel-agsins hevur Símun higar-til spælt 44 landskapping-ardystir og skorað 12 mál. Hann hevur spælt 8 steypadystir og skorað eitt mál, og Símun var steypavinnari saman við Keflavík í 2006.

Harafturat hevur Símun Samuelsen umboðað Keflavík í 8 Europa Cup dystum. Í teimum hevur hann skorað tvey mál. Iva-leyst minnisríkasta málið hjá Símuni fyri Keflavík var tað, tá ið hann í Eur-opa Cup dysti ímóti FC Midtjylland skoraði sig-ursmálið.

Eitt skifti í fjør spældi Símun Samuelsen í Notodden í Noregi, men hann flutti aftur til Kefla-víkar, har hann nú verður í hvussu so er í trý ár afturat.

Símun hevur higartil spælt 16 landsdystir fyri Føroyar, og higarti hevur hann skorað eitt lands-liðsmál.

Í síðstu viku spældi Keflavík seg í fjórðings-finaluna í steypakapping-ini. Keflavík er eftir 10 umfør oddalið í lands-kappingini. Saman við FH hevur Keflavík 22 stig.

Mánakvøldið fara Sím-un Samuelsen og liðfelag-ar hansara at spæla á útivølli ímóti Fram.